16 ára gamal fekk skaða í Irmingarhavinum:

# 19 tímar seinni kom hann við kolbrandi undir læknahond

**16 ára gamli, Rógvi Danielsen úr Havn, var alt annað enn heppin á sínum fyrsta túri til skips. Niðri í lastini á Ljósafelli gjørdist hann fastur í einum bandi, sum reiv bæði húð og kjøt av peikifingrinum og meislaði handabakið og lógvan.**
**Í seks tímar lá hann á skurðstovu í Reykjavík, har læknarnir tóku húð av beininum og settu hana á peikifingurin. Teir tóku eisini húð av undirarminum, sum teir settu á handabakið. At enda varð fremstifingur á vinstru hond skorin upp og seymaður saman við tí illa meislaða peikifingrinum.**
**- Enn er ov tíðliga at siga, hvussu hetta fer at taka seg út, sigur pápin, Gunnleif Danielsen**

ARBEIÐSSKAÐI
*Vilmund Jacobsen*

16 ára gamli, Rógvi Danielsen úr Havn, var alt annað enn heppin á sínum fyrsta túri til skips við djúpvatnstrolaranum, Ljósafelli. Kristi Himmalferðardag, meðan hann var til arbeiðis niðri í lastini á skipinum, sum var á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum, hendi vanlukkan. Neyvan hevur skiparin mett tað, sum hendi, so ógvuliga álvarsamt, tí tað tók nógvar tímar, áðrenn drongurin kom undir læknahond. Skiparin avgjørdi nevniliga at sigla til lands við Rógva heldur enn at boðsenda tyrlu.

### 19 tímar

Meðan teir í lastini tóku ímóti fiskinum hendan dagin, gjørdist vinstra hond á Rógva føst niðri í einum av bondunum. At kalla alt kjøtið á peikifingrinum varð rivið omanav, og húðin á handabakinum og inni í lógvanum skrædnaði eisini niður eftir hondini.

Umborð á Ljósafelli bundu teir um hondina á Rógva, og hann fekk heilivág móti pínu. Kósin varð sett móti Reykjavík. Einar 19 tímar seinni, kundu læknarnir á sjúkrahúsinum í Reykjavík taka hond um skaðan.

Hendingin umborð á Ljósafelli førir við sær, at drongurin nú noyðist at liggja einar tríggjar vikur á sjúkrahúsi í Íslandi, tí læknarnir har yviri vilja sleppa at gera arbeiði liðugt og fylgja tí upp, áðrenn hann fer heimaftur.

Tíðin í Reykjavík er minsti trupulleikin. Ivin um, hvussu fingur og hond verða eftir skaðan, er tað, sum fyllir meira í huganum hjá Rógva og foreldrum hansara, Gunnleifi og Elinborg.

Av tí, at drongurin kom so seint undir læknahond, hevði hann eisini fingin kolbrand í hondina, og tað hevur ikki gjørt arbeiði hjá læknunum lættari.



*Í seks tímar lá 16 ára gamli, Rógvi Danielsen úr Havn, á skurðstovu í Reykjavík eftir skaðan, hann fekk umborð á Ljósafelli í Irmingarhavinum kristi himmalferðardag. - Sjúkralegan í Íslandi verður long, helst einar tríggjar vikur, sigur pápin, Gunnleif Danielsen. ååEnn veit eingin, hvussu skaðin kemur at taka seg út*

Enn veit eingin, hvussu alt fer at taka seg út, tá ið avtornar, tí enn er ov stutt tíð fráliðin, og enn eru skurðviðgerðirnar ikki lidnar.

Bæði foreldrini hjá Rógva hava verið yviri í Íslandi hjá soninum meginpartin av tíðini, síðan vanlukkan hendi. Tey komu heimaftur sunnudagin, men pápin fer yviraftur seinni í hesi vikuni.

### Lá 6 tímar á skurðstovu

Pápin, Gunnleif Danielsen, sigur, at sonurin lá í seks tímar á skurðstovu undir fullari narkosu, har læknarnir sum frægast royndu at fáa skil á aftur fingurin, handabakið og lógvan.

- Læknarnir hava tikið húð av beininum og hava sett hana á peikifingurin. Húð er eisini skorin av undirarminum og sett á handabakið. Síðan er fremstifingur á vinstru hond skorin upp og seymaður saman við tí meislaða peikifingrinum.

Hann sigur, at fingrarnir eru seymaðir saman fyri at geva gróðrarevni til peikifingurin, sum var so illa farin.

- Ætlanin var, at fingrarnir skuldu skerast sundur aftur í hesi vikuni, men hetta er nú útsett til komandi viku, tí læknarnir mettu, at ov lítið lív var komið í fingurin, tá ið ætlanin annars var, at teir skuldu loysast sundur aftur.

Sambært læknunum, er ógjørligt at siga, hvussu hetta kemur at taka seg út, fyrr enn fingrarnir eru loystir sundur aftur.

Gunnleif fegnast um, at gróðrarevnini hava víst seg at vera góð, og at sonurin nú hevur tað betri.

### Nógv pína

- Sum eg skilji, hevði Rógvi tað eftir umstøðunum hampiliga gott, meðan teir sigldu inn til Reykjavíkar. Fingurin og hondin hava ivaleyst verið doyvd av skaðanum, og hann fekk eisini doyvandi umborð. Tá ið hann kom til lands, byrjaði líka sum lív at koma í aftur, og í fleiri dagar hevði Rógvi ógvuliga nógva pínu. Læknarnir hava givið honum morfin, men neyðugt hevur verið at skift til onnur evni, tí hann gjørdist bundin at evnunum.

Gunnleif veit ikki at siga, hví skiparin á Ljósafelli avgjørdi ikki at boðsenda tyrluni, men valdi at sigla longu leiðina til lands við Rógva.

- Eg trúgvi, at hann hevur feilmett støðuna.

Spurdur, um hann hevur tosað við skiparan, sigur pápin at enda, at tað hevur hann.

- Men eg havi ikki tosað við hann um júst, hví tyrlan ikki varð boðsend eftir dreinginum, sigur hann.

Sum skilst, hava fjølmiðlarnir í Íslandi tikið málið upp og undrast yvir, hví Rógvi Danielsen kom so seint undir læknahond.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Verkfallið kostaði Havsbrún einar 14 milliónir í yvirskoti

**– Vit vera noydd at repa seglini eftir verkfallið, sigur Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Nú verða vit boydd at repa seglini.

Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún, sigur at verkfallið hevur verið dýrt fyri Havsbrún.

Hann sigur, at verkfallið hevur gjørt, at yvirskotið hjá Havsbrún í ár verður upp ímóti 14 milliónum minni í ár, enn tað annars kundi verið.

Hann sigur, at verkfallið gjørdi, at Havsbrún misti 34 heilar framleiðsludagar.

– Hetta er annars besta árstíðin hjá einum virki hjá Havsbrún. Hetta er tíðin, tá ið vit forvinna ein stóran part av ársinntøkuni. Men nú er tað farið fyri skeytið.
Hann sigur, at hesa tíðina, verkfallið vardi, misti Havsbrún 57.000 tons av rávøru, umframt eina fóðursølu upp á 2.500 tons.

Og hetta er ikki tað einasta, tí fyri tveimum árum síðani, misti Havsbrún eisini níggju milliónir í yvirskoti av verkfallinum, sum tá var.

Sostatt hava vit upp á tvey ár mist yvir 20 milliónir í ektaðum yvirskoti av verkføllum.



*– Verkfallið kostaði okkum útvið 14 milliónir krónur í ektaðum yvirskoti.Tað sigur seg sjálvt, at hetta merkist og nú má virksemið lagast til nýggju umstøðurnar, sigur Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún*

Harafturat føra lønarhækkingarnar við sær, at Havsbrún fer at fáa hálvaaðru til tvær milliónir eyka í lønarútreiðslum um árið, tá ið øll lønarhækkingin er tald við.

### Mugu repa seglini

Bergur Poulsen sigur, at tað sigur seg sjálvt, so stórur missur fer at fáa álvarsligar avleiðingar.

– Sjálvandi mugu vit alla tíðina laga virksemið til tær inntøkur vit hava. Sostatt slepst ikki uttan um, at vit verða noydd at repa seglini eftir teimum nýggju umstøðunum, og at fremja rationaliseringar.

Hann sigur, at tað fer eisini uttan iva at ávirka tær útbyggingar, sum ætlanin hevur verið at gera, tí nú verða onkrar íløgur útsettar. Hvørjar rationaliseringar, talan verður um, og akkurát, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa fyri virksemið og starvsfólkið, veit hann ikki enn.

– Vit mugu gera støðuna upp og so mugu vit finna loysnir, so at vit sleppa burturúr hesum við skinninum á nøsini.

Hann vísir eisini á, at trupla støðan í alivinnuni ávirkar eisini Havsbrún nógv.

– Men verkfallið var ein stórur steinur oman á byrðuna, leggur hann afturat.

Hann leggur tó dent á, at ongin er uppsagdur og at ongar ítøkiligar ætlanir eru um at siga fólkið upp.

Bergur Poulsen sigur, at eini 45 fólk hjá Havsbrún vóru í verkfalli.

– Verkfallið varð sanniliga eisini dýrt hjá teimum, tí tey mistu yvir tríggjar milliónir í lønarinntøku hesar vikurnar, tey vóru við hús.

Verkfallið hevur eisini ført við sær, at Havsbrún hevur mist onkrar ordrar.

– Tað hevur eisini ført við sær, at fyri at kunna levera til okkara viðskiftafólk hava vit verið noydd at keypt mjøl úr Íslandi, sum er gjørt burturúr fiski, sum føroysk skip hava avreitt har yviri undir verkfallinum.

Sostatt verður fiskurin, sum føroysk skip hava avreitt uttanlands í verkfallinum, nú brúktur til at kappast ímóti okkum sjálvum við, sigur Bergur Poulsen.

### Tola ikki aftur

Bergur Poulsen sigur, at samfelagið tolir ikki eitt verkfall afturat upp á fýra virkur.

Tí heldur hann, at tað er ógvuliga umráðandi, at arbeiðsmarknaðurin verður betri skipaður.

– Tað hevði tænt bæði arbeiðsgevrum og arbeiðstakarum, at greiðari mannagongdir verða gjørdar fyri, hvussu farast skal fram.

Hann hugsar um høvuðsavtalur, reglur um seming og frumatkvøðugreiðslur.

– Tað eigur ikki at vera so lætt hjá tilvildarliga valdum fakfelagsleiðarum ella tilvildarligum nevndarlimum í arbeiðsgevarafelagnum at leggja landið lamið av verkfalli.

Við hesum hevur hann ikki meint við ávís fólk í hesari ósemjuni.

– Vit vit mugu hava reglar fyri, hvussu vit bera okkum at, tá ið vit ikki semjast. Og verkfall skal ikki vera, fyrrenn vit vita við vissu, at ósemjan er so stór, at ongin vegur er uttanum, sigur Bergur Poulsen.

# Tað er øgiliga strævið at koma aftur upp í part

**– Verkfallið hevur tikið ein heilan mánað burturúr álmanakkanum og tí verður tað øgiliga strævið tað næstu tíðina, sigur Rói Egholm á fiskasøluni, Farex**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Eitt verkfall, sum hetta er ómetaliga óheppið.

Rói Egholm á fiskasøluni, Farex, sigur, at verkfallið hevur rakt útflutningin av fiski hart.

Men hann heldur ikki, at teir beinleiðis hava mist sáttmálar av verkfallinum.

– Vit hava sáttmálar, sum ganga yvir langa tíð, men verkfallið hevur so gjørt tað, at teir verða skumpaðir eitt sindur longri fram í tíðina, enn ætlanin annars var.

Hann sigur, at trupulleikin, sum er tyngstur at vinna á, er marknaðurin fyri feskan fisk.



*Trupulleikin í Føroyum er, at tey, sum hava samráðingarrættin á arbeiðsmarknaðinu, brúka hann ikki, sigur Rói Egholm á fiskasøluni, Farex*

– Har selja vit viku fyri viku og tá ið vit ikki fáa leverað, leita keypararnir aðrastaðni eftir fiski. Tì verða vit noyddir at brúka nógvar kreftir uppá at koma inn aftur á marknaðin. Og tá ið vit eru burtur frá marknaðinum í ein heilan mánað, er tað ógvuliga strævið at koma inn aftur á marknaðin.

Hann sigur, at keypararnir hava nevniliga heldur ikki gloymt, at verkfall var eisini fyri tveimum árum síðani, tí skal nógv til at sannføra teir um, at vit framvegis eru verdir at handla við.

Men hann veit ikki um vit fara at missa keyparar í longdini, men tað er ilst at siga.

– Vit hava væl av fiski og tað fara altíð at verða keyparar. Men keyparar illneitast inn á føroyingar og trupulleikin fer serliga at stinga seg upp, tá ið marknaðurin er vánaligur.

– Tá ið marknaðurin er vánaligur, loysir tað seg serliga væl at hava góð viðurskifti við keypararnar, tí so raðfesta teir teg frammaliga, táið teir keypa fisk.

– Men, sum umstøðurnar eru nú, skulu vit ikki vænta at fáa tað raðfestingina, sum vit hava brúk fyri, táið marknaðurin er vánaligur. Tá fara teir at brúka tað ímóti okkum at vit ikki fingu levera í fýra vikur og tað kann kosta okkum í longdini, sigur Rói Egholm.

### Misnýta samráðingarrættin

Rói Egholm sigur, at hesi verkføllini, sum eru í Føroyum, koma ikki fyri aðrastaðni.

– Vit hava sæð, at verkføll eru í Fraklandi og aðrastaðni. Har gongur tað ógvuliga hart fyri seg við umfatandi herverkum, men tað er ikki meir enn nakrar heilt fáar dagar, so verður ósemjan loyst.

Hann sigur, at heilt stóri trupulleikin í Føroyum er, at tey, sum hava samráðingarrættin fyri føroyska arbeiðsmarknaðinum, brúka hann ikki.

– Tey, sum hava samráðingarrættin, hava eina ómetaliga stóra ábyrgd og tey mugu taka fulla ábyrgd av samráðingarrættinum, so at samfelagið ikki bløðir so illa, sum tað hevur gjørt, tí at hesin rætturin verður misrøktur, sigur Rói Egholm á Farex.